KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 11.09.2014 kl. 17:30
Málnr.: 13/00245

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygdóttur, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen.

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
77/14	12/01172-60	Stroyming av býráðsfundum - eftirmeting
78/14	14/00159-7	Dagføring av fundarskipan Klaksvíkar Býráðs, eftirmeting - *fyrra viðgerð*
79/14	14/00726-1	Ikki-kommunalar verkætlanir – krav til umsóknir
80/14	13/00759-24	Lendi til at endurreisa hús Nólsoyar Páls á
81/14	14/00665-2	Vegir til eldri sethúsaøkir o.a.
82/14	14/00677-1	Fíggjarætlan 2015, Klaksvíkar Býráð - fíggjarkarmurin
83/14	14/00119-16	Havnin í Árnafirði - skaði í uppgangi í jan. 2014 - *eykajáttan, fyrra viðgerð*
84/14	14/00654-1	Bráfeingis skiftan av vindeygum í summarsteðginum, Blákollan - *eykajáttan, fyrra viðgerð*
85/14	14/00741-1	Játtan flytast frá Snjallubjallu til NR/Sernám og Barnaansing Felags - *eykajáttan, fyrra viðgerð*
86/14	14/00513-7	Ung í arbeiði, 2014 - *eykajáttan, seinna viðgerð*
87/14	14/00551-1	Byggibúning, Bústaðir, 2014 - *eykajáttan, seinna viðgerð*
95/14	14/00730-2	**EYKAMÁL** Umsókn um frávik frá byggilinju, Bústaðir - matr. nr. 1463

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Til viðgerðar

77/14
12/01172 Stroyming av býráðsfundum, eftirmeting

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	09.09.2014	68/14	
2 Klaksvíkar Býráð	11.09.2014	77/14	

Frágreiðing um málið:
Almennu fundir Klaksvíkar Býráðs hava síðani 24. apríl 2014 verið stroymaðir á alnótini. Býráðið samtykti á fundum 20. februar og 20. mars 2014, at stroymingin skuldi eftirmetast eftir hálvum ári, og er nú stundin komin til hesa eftirmeting.

Stroymað hevur verið frá trimum fundum, og hava royndirnar higartil hava verið góðar. Sambært hagtølum frá veitaranum (Raclip) vóru fleiri enn 180 hyggjarar til fundin 24. apríl og um 40 til fundirnar 22. mai og 19. juni. Umsitingin hevur havt avtalu við nakrar hyggjarar um at fylgja við stroymingini og koma við afturmelding um teknisku dygdina (ljóð- og myndadygd); hesir hyggjarar meta allir teknisku dygdina at hava verið góða.
Veitarin er eisini nøgdur við stroymingina og samstarvið sum heild, og er hann fúsur at halda fram við samstarvinum.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Verður avgjørt at halda fram við at stroyma frá býráðsfundunum, er helst neyðugt at skipa teknisku viðurskiftini í býráðshøllini meira varandi. Her verður hugsað um ymsar leidningar, sum verða lagdir fram og tiknir burtur til hvønn fund.
Avtalan við veitaran er, at goldið verður fyri hvønn fund sær - kr. 3.437,50 v/mvg. Vanliga hevur Býráðið 10 fundir um árið.

Tilmæli:
Verður lagt fyri nevnd og býráð til eftirmetingar og støðutakan um framhaldandi stroyming.

Nevndarsamtyktir:
FíN 09-09-2014: Nevndin mælir til, at skipanin við stroyming heldur fram, til hon hevur virkað í eitt ár, tvs. til apríl 2015.

BýR 11-09-2014: Samtykt at taka undir við FíN 09-09-2014.

78/14
14/00159 Dagføring av fundarskipan Klaksvíkar Býráðs, eftirmeting - *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	09.09.2014	69/14	
2 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	11.09.2014	78/14	
3 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	09.10.2014		

Frágreiðing um málið:
Klaksvíkar Býráð samtykti á fundum 20. februar og 20. mars 2014 eina dagføring av fundarskipan tess. Við dagføringini vórðu gjørdar broytingar í talutíðum býráðslimanna, soleiðis at talutíðirnar nú eru 3, 2 og 2 minuttir fyri hvønn býráðslim pr. mál til viðgerðar á býráðsfundi. Samstundis samtykti Býráðið, at talutíðirnar - umframt stroyming av býráðsfundum - skuldu eftirmetast eftir hálvum ári.
Undir viðgerðini av talutíðunum kom ynski fram um, at borgarstjórin í stórum, týdningarmiklum málum - t.d. fíggjarætlan - kundi loyva hvørjum býráðslimi longri talutíð.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, §5, stk. 3 (*Um fundarskipan í kommunustýrum*)
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar Býráðs, §3 (*Um fundarskipan*)
Fundarskipan Klaksvíkar Býráðs, § 7, 5. og 7. petti (*Um talutíðir*)
Fundarskipan Klaksvíkar Býráðs, §20 (*Broytingar í fundarskipanini*)

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Verður lagt fyri nevnd og býráð til eftirmetingar og støðutakan.

Nevndarsamtyktir:
FíN 09-09-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 20-08-2014, og mælir til, at talutíðirnar verða tríggjar ferðir tríggjar minuttir fyri hvønn býráðslim pr. mál. Somuleiðis mælir nevndin til, at talutíðirnar verða eftirmettar saman við eftirmetingini av stroymingini í apríl 2015.

BýR 11-09-2014: Gunvá við Keldu setti broytingaruppskot fram, har avmarking á talutíðunum skal strikast. Broytingaruppskotið fall við 5 atkvøðum fyri - Gunvá við Keldu, Eyðstein Ó. Poulsen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen - og 6 atkvøðum ímóti - Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Signhild V. Johannesen og Kristian Eli Zachariasen.

Tilmælið frá FíN 09-09-2014 einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

79/14
14/00726 Ikki-kommunalar verkætlanir – krav til umsóknir

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	01.09.2014	45/14	
2 Mentanarnevndin	01.09.2014	38/14	

3 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	02.09.2014	30/14	
4 Havna- og Vinnunevndin	02.09.2014	35/14	
5 Trivnaðarnevndin "Eldri & Bústaðir"	02.09.2014	12/14	
6 Tekniska Nevnd	03.09.2014	31/14	
7 Fíggjarnevndin	09.09.2014	70/14	
8 Klaksvíkar Býráð	11.09.2014	79/14	

Frágreiðing um málið:
Borgarstjórin hevur heitt á umsitingina um at leggja eitt uppskot um leiðreglur um krøv til umsóknir um stuðul til ikki-kommunalar verkætlanir fyri viðkomandi nevndir og byráð. Í hesum sambandi verður upplýst, at kommunan síðani 2007 hevur havt eina reglugerð fyri kommunalar verkætlanir.

Vit kunnu staðfesta, at mannagongdirnar ikki er nóg greiðar innan hetta økið, og hevur hetta gjøgnum árini ført til ávísar avbjóðingar.

Skotið verður upp, at kommunan hevur niðanfyri standandi reglur viðvíkjandi umsóknum, sum hava við ikki-kommunalar verkætlanir at gera:

- Lýsing av innihaldi í verkætlanini,
- Tekningar ella skitsur,
- Kostnaðarætlan,
- Rakstrarætlan,
- Eginfígging,
- Møgulig tilsøgn um aðra fígging,
- Tíðarætlan og
- Navn á kontaktpersóni, ábyrgdarpersóni ella felagi.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin viðmerking

Tilmæli:
Vegna borgarstjóran verður málið við hesum lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð til støðutakan.

Nevndarsamtyktir:
UBN 01-09-2014: Nevndin tekur undir við at gera reglur viðvíkjandi umsóknum, sum hava við ikki-kommunalar verkætlanir at gera.

MeN 01-09-2014: Nevndin tekur undir við UBN 01-09-2014.

TrN B&U 02-09-2014: Nevndin tekur undir við UBN 01.09.2014

HaVN 02-09-2014: Nevndin tekur undir við UBN 01.09.2014.

TrN E&B 02-09-2014: Nevndin tekur undir við UBN og MeN 01-09-2014, og TrN B&U og HaVN 02-09-2014

TN 03-09-2014: Nevndin tekur undir við UBN 01-09-2014, MeN 01-09-2014, TrN B&U 02-09-2014, HaVN 02-09-2014 og TrN E&B 02-09-2014.

FíN 09-09-2014: Nevndin tekur undir við UBN og MeN 01-09-2014, TrN B&U, HaVN og TrN E&B 02-09-2014 og TN 03-09-2014.

BýR 11-09-2014: Tilmælið frá FíN 09-09-2014 einmælt samtykt.

80/14
13/00759 Lendi til at endurreisa hús Nólsoyar Páls á

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	01.09.2014	46/14	
2 Mentanarnevndin	01.09.2014	39/14	
3 Ferðslunevndin	02.09.2014	9/14	
4 Tekniska Nevnd	03.09.2014	32/14	
5 Fíggjarnevndin	09.09.2014	79/14	
6 Klaksvíkar Býráð	11.09.2014	80/14	

Frágreiðing um málið:
Samskifti hevur verið millum borgastjóran, formannin í TN, vinnu- og mentanarstjóran, formannin í Áhugafelagnum Nólsoyar Páll, og umboði verkætlanina Koyriland (Sp/f Trøllapætur).

Partarnir eru vorðnir samdir um, at tað, ið tænir báðum verkætlanunum best, er at finna eina felags loysn á staðsetingini fyri báðar verkætlanirnar.

Møguleikar eru fyri at flyta verkætlanina við koyrilandi saman við Trøllapætur-húsinum niðan á Geilina, har tað fyri nøkrum árum síðani varð arbeitt við eini líknandi verkætlan. Tó krevur hetta, at býráðið eisini er sinnað at lata øki og gera tað klárt til verkætlanina.

Sum Áhugafelagið Nólsoyar Páll hevur víst á skrivi til allar býráðslimirnar, sær tað bestu fortreytir fyri Nólsoyar Páll-húsinum at vera á fram við Vágni á Biskupsstøð/Tingstøðini.

Fíggjarligar avleiðingar:
Verður lýst nærri á fundinum.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyri nevnda konstruktiva samskifti millum allar partar í málinum verður við hesum skotið upp, at

- Nólsoyar Páll-húsið verður staðsett á Biskupsstøð, eins og ætlan áhugafelagsins leggur upp til,
- Klaksvíkar kommuna letur lendi til Nólsoyar Páll-verkætlanina við eini tíðaravmarking á tvey ár,
- verkætlanin Koyriland fær øki á Geilini (2715 m^2) við eini tíðaravmarking á tvey ár,
- Klaksvíkar kommuna ger økið á Geilini klárt til Koyriland verkætlanina.

Nevndarsamtyktir:
UBN 01-09-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 29-08-2014.

MeN 01-09-2014: Nevndin tekur undir við UBN 01-09-2014.

FeN 02-09-2014: Nevndin tekur undir við málinum, men heitir á umsitingina um at kanna ferðsluviðurskiftini – serliga bil-, súkklu- og gonguferðsluna – og parkeringsviðurskiftini kring verkætlanirnar nærri og leggja fyri nevndina aftur á komandi fundi.

TN 03-09-2014: Nevndin tekur undir við UBN 01-09-2014, MeN 01-09-2014 og FeN 02-09-2014.

FíN 09-09-2014: Nevndin tekur undir við UBN 01-09-2014, MeN 01-09-2014, FeN 02-09-2014 og TN 03-09-2014.

BýR 11-09-2014: Tilmælið frá FíN 09-09-2014 einmælt samtykt.

81/14
14/00665 Vegir til eldri sethúsaøkir o.a.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	01.09.2014	52/14	
2 Tekniska Nevnd	03.09.2014	33/14	
3 Klaksvíkar Býráð	11.09.2014	81/14	

Frágreiðing um málið:
Kommunan hevur seinastu árini arbeitt við ráðleggingararbeiði av ymiskum vegaloysnum í sethúsaøkjum, har eingin koyrivegur er. Talan er um eldri útstykkingar, sum eru gjørdar, áðrenn kommunan fekk samtykta byggiætlan, og áðrenn vegir eru útlagdir í matrikkulin.

Talan er tilsamans um einar 48 ognir.

Upplýst verður, at nógv samskifti hevur verið við borgarar, sum eiga ognir í eldri økjum, og síðani 2004 hevur kommunan framt vegirnar oman Reyðhús og Stangaskákið, har tilsamans 36 ognir hava fingið vegaatkomu (nevndu vegir eru ikki lidnir enn).

Tá sitandi býráð tók við leiðsluni, varð givið til kennar, at dentur skuldi leggjast á at gera rakstrar- og íløguarbeiðir liðug, og hevur hetta størri týdning enn nýggj arbeiðir, tá um undirstøðukervið ræður.

Málini um vegir til gomlu sethúsaøkini eru oftast viðgjørd sum einstøk mál, men í 2008 eru málini viðgjørd undir einum, og í 2011 er samtykt at byrja og at fremja vegaarbeiðið sambært fíggjarorkuni hjá kommununi.

Tekniska Umsiting hevur eisini viðgjørt spurningin í samband við býarskipanararbeiðið, har tosað hevur verið um nýggjar útstykkingar í øðrum kommunum, sum ikki hava koyriveg til hvørt sethús. Dømi er um hetta í Tórshavn í nýggjari tíð.

Umsitingin hevur vegleiðandi mett samlaðan kostnað av møguligum vegum til omanfyri nevndu økir til 9 - 12 mió. kr. Hetta merkir, at vegur til hvørja einstaka ogn kostar í miðal 250 tkr.
Møguligur vegur til økið omanfyri Klaksvíksvegin (á Selheyggi), har eini 6 sethús eru er ikki tikin við, tí umsitingin hevur mett, at møguligur vegur verður sera trupul og kostnaðarmikil at fremja.

Um gongugøtur í gomlum økjum ístaðin verða dagførdar, og almenn parkeringspláss gjørd til økini, kann roknast við einum samlaðum kostnaði upp á 4 - 5 mió. kr. Upplýst verður, at flestu gongugøtur liggja sum privatar, og hava íbúgvar tinglisnan gongurætt. Hendan loysnin kostar í miðal einar 100 tkr. pr. ogn.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin viðmerking.

Tilmæli:
Við hesum verður málið beint til viðkomandi nevndir og býráð, og verður lagt upp til eina prinsipviðgerð, og vóna vit, at ein yvirskipað "politisk" støða kann verða tikin til mál av hesum slagnum.

Heitt verður á viðkomandi nevndir og býráð um at siga umsitingini, hvønn málsetning kommunan hevur:
1. um koyrivegur skal gerast til hvørja sethúsaogn í kommununi, ella
2. um gongugeilar ella gøtur skulu dagførast, og parkeringsøkir gerast, har hetta er neyðugt.
3. ella, um tað skal verða ein blandingur av 1. og 2.

Tá støða er tikin til málið, er ætlanin at umsitingin ger uppskot til raðfesting av neyðugu arbeiðunum, og tá raðfestingin er samtykt, kunnu borgarar kunnast um avgerð býráðsins.

Nevndarsamtyktir:
UBN 01-09-2014: Nevndin mælir til, at vegir verða gjørdir, har tað letur seg gera.

TN 03-09-2014: Nevndin tekur undir við UBN 01-09-2014.

BýR 11-09-2014: Tilmælið frá TN 03-09-2014 einmælt samtykt.

82/14
14/00677 Fíggjarætlan 2015, Klaksvíkar Býráð - fíggjarkarmurin

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	09.09.2014	84/14	
2 Klaksvíkar Býráð	11.09.2014	82/14	

Frágreiðing um málið:
Hervið verður mál lagt fyri fíggjarnevndina um gerð av uppskoti til fíggjarætlan 2015. Samtykta uppskotið verður síðani lagt fyri býráðið innan freistina, sum er 1. oktober.

Fíggjarætlan 2015
Í niðanfyri standandi talvu er høvuðuskarmurin fyri fíggjarætlanina 2015 uppsettur. Rakstrarútreiðslurnar hækka 3,2 mió. kr. frá 106,8 mió. kr, sum er uppruna fíggjarætlanin fyri 2014, til 110,0 mió. kr. í fíggjarætlanini fyri 2015.

Til samanberingar brúkti kommunan 108,9 mió. kr. til rakstur í 2013, og er økingin sostatt 1,1 mió. kr. í mun til roknskapin fyri 2013.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

				Broytingar				
		Roknskapur	Uppruna	Lønir	Foreldra-		Hækking	1. uppskot
	Kommunugrein	2013	ætlan 2014	+1,90%	gjald	Bussleið	íalt	ætlan 2015
§1	Kommunal fyrisiting	16.579.171	16.559.000	315.000			315.000	16.874.000
§2	Almanna- og heilsumál	18.388.911	15.183.000	215.000			215.000	15.398.000
§3	Børn og ung	28.021.506	29.702.000	810.000	455.000		1.265.000	30.967.000
§4	Útbúgving og gransking	9.132.022	8.957.000	100.000			100.000	9.057.000
§5	Mentan og frítíð	11.137.619	9.901.000	145.000			145.000	10.046.000
§6	Teknisk mál	18.133.033	17.142.000	285.000			285.000	17.427.000
§7	Kommunalt virki	7.489.843	9.316.000	130.000		800.000	930.000	10.246.000
	Rakstrarútreiðslur	**108.882.105**	**106.760.000**	**2.000.000**	**455.000**	**800.000**	**3.255.000**	**110.015.000**
§20	Rentustuðul	5.424.059	5.500.000				0	5.500.000
§20	Fíggjarútreiðslur netto	6.648.322	7.000.000				0	7.000.000
		120.954.486	119.260.000	2.000.000	455.000	800.000	3.255.000	122.515.000
§20	Inntøkur	-167.578.503	-163.500.000	-3.500.000			-3.500.000	-167.000.000
	Úrslit áðr. Íløgur og avdr.	**-46.624.017**	**-44.240.000**	**-1.500.000**	**455.000**	**800.000**	**-245.000**	**-44.485.000**

Galdandi sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum hækka 1. oktober við 1,9%. Í upprunafíggjarætlanini 2014 eru lønarútreiðslurnar mettar til góðar 75 mió. kr., og lønarhækkingar og reguleringar í starvsaldrum v.m. merkja, at raksturin økist við ca. 2 mió. kr.

Rentustuðulin er settur til 5,5 mió. kr og rentuútreiðslurnar til 7,0 mió. kr.

Inntøkurnar eru mettar til 167 mió. kr. Inntøkurnar vóru í 2013 167,6 mió. kr, og metingin fyri 2014 er, at inntøkurnar verða umleið 163,5 mió. kr.

Við hesum fyritreytum verður rakstrarúrslitið 44,5 mió. kr.

Lógargrundarlag:
Ásetingarnar um gerð av fíggjarætlan eru í § 39 í kommunulógini:

§ 39. Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.

Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Fíggjarligar avleiðingar:
Sí frágreiðing omanfyri.

Tilmæli:
Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur støðu til høvuðstølini: inntøkur, rakstur, íløgur og fíggjarpostar (sí talvuna á s. 1), og leggur hesi fyri býráðið til víðari viðgerð.

Nevndarsamtyktir:
FíN 09-09-2014: Nevndin mælir til niðanfyristandandi útgangsstøði fyri fíggjarkarmin fyri fíggjarárið 2015:

Inntøkur	161.500.000	kr.
Rakstur	110.015.000	kr.
	51.485.000	kr.
Rentur	7.000.000	kr.
	44.485.000	kr.
Avdráttir	8.000.000	kr.
	36.485.000	kr.
Íløgur	36.485.000	kr.
Javnvág	0	kr.

BýR 11-09-2014: Tilmælið frá FíN 09-09-2014 einmælt samtykt.

83/14
14/00119 Havnin í Árnafirði - skaði í uppgangi í jan. 2014 - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Havna- og Vinnunevndin	02.09.2014	37/14	
2 Fíggjarnevndin	09.09.2014	78/14	
3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	11.09.2014	83/14	
4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	09.10.2014		

Frágreiðing um málið:
Málið um brimskaðan á havnina í Árnafirði er viðgjørt í mars 2014, og samtykt er, at skaðin skal umvælast skjótast tilber, og arbeiðið fíggjast av íløgukontoini hjá Klaksvíkar Havn. Umvælingin av skaðanum kostaði kr. 230.000,-.

Upplýst verður, at onnur øki hava fingið eykajáttan til stormskaðar í árinum., t.d. gøtuljósini.

Leiðslan og stjórar hava umrøtt málið, og semja er um at leggja eina umbøn um eykajáttan fyri viðkomandi nevndir og býráð.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið hevur sum avleiðing, at íløgusíðan á fíggjarætlanin fyri 2014 hækkar við kr. 230.000,-, og tí skal málið samtykkjast 2 ferðir í býráðnum, og Fíggjarmálaráðið skal kunnast.

Tilmæli:
Við hesum verður mælt til eina eykajáttan til Klaksvíkar Havn uppá kr. 230.000. Mælt verður til, at peningurin verður tikin av *tøkum peningi*.

Nevndarsamtyktir:
HaVN 02-09-2014: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 28-08-2014.

FíN 09-09-2014: Nevndin tekur undir við HaVN 02-09-2014.

BýR 11-09-2014: Tilmælið frá FíN 09-09-2014 einmælt samtykt.

84/14
14/00654 Bráfeingis skiftan av vindeygum í summarsteðginum, Blákollan - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	02.09.2014	34/14	
2 Fíggjarnevndin	09.09.2014	75/14	
3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	11.09.2014	84/14	
4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	09.10.2014		

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 28-08-2014, har greitt verður frá trupulleikum, ið Blákollan hevur havt av vindeygum, ið leka. Trupulleikarnir vóru nú so stórir, at neyðugt var at skifta vindeygu út, og valt varð at fremja hetta arbeiðið í summarsteðginum.

Lógargrundarlag:
Í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006 er m.a. ásett niðanfyristandandi:
§ 6. *Stk. 2. Húsaútreiðslur verða rindaðar av kommununi.*

Í Kommunustýrislógini er ásett í § 21, stk. 3, at *"borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða ella har ongin orsøk er til iva*", og í §31, stk. 5, at *"nevndarformaður kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða, ella har ongin orsøk er til iva. Tó skal borgarstjórin kunnast, áðrenn avgerð verður tikin í málum, ið ikki tola at bíða, uttan so er, at tað snýr seg um avgerðir, sum við lóg eru latnar nevndini.*

Vísandi til, at hetta mál ikki toldi at bíða eftir nevndar- og býráðsviðgerð, tóku borgarstjórin og nevndarformaðurin avgerð um at fremja hesar umvælingar beinanvegin, har tær 3 vikurnar í summarfrí í summar vóru einasti møguleiki fyri at fáa hetta gjørt í ár.

Fíggjarligar avleiðingar:
Tað er avsetingin til kontubólkin "Barnaansing, Felags", sum vanliga fíggjar slíkar ábøtur, ið koma undir størri umvælingar og viðlíkahald av bygningum innan dagstovnaøkið.

Í sambandi við sølu av Dagtilhaldinum, sum verður lýst í øðrum máli, verður mælt til at flyta kr. 500.000,- av teimum søluinntøkunum til "Barnaansing, Felags" sum ein íløgujáttan til fastognir, og tað er haðani, at henda umvæling verður fíggjað.

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir við fremjingini av teimum her lýstu, neyðugu umvælingum av bygninginum hjá Blákolluni, sum umsitingin – við heimild frá borgarstjóranum og formanninum í Trivnaðarnevndini Børn & Ung setti í verk nú í summarsteðginum.

Nevndarsamtyktir:
TrN B&U 02-09-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 28.08.2014.

FíN 09-09-2014: Nevndin tekur undir við TrN B&U 02-09-2014.

BýR 11-09-2014: Tilmælið frá FíN 09-09-2014 einmælt samtykt.

85/14
14/00741 Játtan flytast frá Snjallubjallu til NR/Sernám og Barnaansing Felags - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	02.09.2014	35/14	
2 Fíggjarnevndin	09.09.2014	76/14	
3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	11.09.2014	85/14	
4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	09.10.2014		

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 29-08-2014, har m.a. verður greitt frá, at í sambandi við fíggjaruppfylgingarnar av inniverandi fíggjarætlan fyri 2014 er komið fram, at skeivar avsetingar eru til onkur rakstrarstøð, og tað er í hesum sambandi, at hetta mál verður reist fyri at rætta upp á hesar við flytingum millum kontur.

Lógargrundarlag:
Talan er í hesum føri um tríggjar stovnar/rakstrarstøð, sum øll eru innan málsøkið ”Børn & Ung”, har hesar eru fevndar av ásetingunum í dagstovnalógini.

Fíggjarligar avleiðingar:
Talan er um óbrúkta játtan, sum er ov nógv játtað einum stovni, og sum við hesum verður játtað øðrum stovnum, sum hava manglandi játtanir. Sostatt vil broytingin sannlíkt elva til eina størri nýtslu, enn um játtanin varð standandi hjá Snjallubjallu, tí tann stovnurin hevði ikki tørvi á henni.

Tilmæli:
Mælt verður til, at 350.000,- kr. verða fluttar millum kontur, frá kontubólkinum ”Frítíðarskúlin (Snjalla-bjalla) til niðanfyri nevndu kontubólkar, har avsetingin verður lutað út á hesar kontur:

	Verandi játtan	Flutt til játtanina	Nýggj játtan
Barnaansing felags, eykajáttan ísv. langtíðarsjúku	0,-	200.000,-	200.000,-
NR/Sernám, eykajáttan til stuðulskontu o.a. útr.		150.000,-	

Nevndarsamtyktir:

TRN B&U 02-09-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 29.08.2014.

FíN 09-09-2014: Nevndin tekur undir við TrN B&U 02-09-2014.

BýR 11-09-2014: Tilmælið frá FíN 09-09-2014 einmælt samtykt.

86/14
Ung í arbeiði, 2014 - *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	11.09.2014	86/14	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 19. juni 2014

Nevndarsamtyktir:
TrN B&U 10-06-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum, treyta av at samskiparin er partur av starvsfólkahópinum hjá KK. Nevndin mælir til at kr. 50.000 frá økinum TRN B&U verður tikin av íløgujáttan til skúlabygging, treytað av at peningurin verður nýttur til at prýða um skúlaøkið.

MeN 10-06-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum, treyta av at samskiparin er partur av verandi umsiting og økir innan mentan eisini verða umfataði av arbeiðinum.

HaVN 10-06-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum, treyta av at samskiparin er partur av verandi umsiting, og økir innan Havna- og Vinnuøkið eisini verða umfataði av arbeiðinum. Mælt verður til at neyðug eykajáttan, kr. 50.000,-, verður tikin innan Havnin Rakstur.

TN 11-06-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum, treytað av, at samskiparin er partur av verandi umsiting, og økir innan tekniska økið eisini verða umfataði av arbeiðinum. Mælt verður til, at neyðug eykajáttan, kr. 50.000,-, verður tikin innan *Vegir, Rakstur*.

UBN 11-06-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum og játtar kr. 70.000,-

TrN E&B 10-06-2014: Kunnað varð um málið. Nevndin hevur ongan pening at vísa á.

FíN 17-06-2014: Nevndin tekur undir við MeN 10-06-2014, HaVN 10-06-2014, TrN B&U 10-06-2014, TN 11-06-2014 og UBN 11-06-2014 og vísir á, at kr. 50.000,- frá MeN verður tikin av kontuni *Keyp av listaverki*.

BýR 19-06-2014: Tilmælini frá MeN 10-06-2014, HaVN 10-06-2014, TrN B&U 10-06-2014, TrN E&B 10-06-2014, TN 11-06-2014, UBN 11-06-2014 og FíN 17-06-2014 einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

BýR 11-09-2014: Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

87/14
14/00551 Byggibúning, Bústaðir, 2014 - *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	11.09.2014	87/14	

Nevndarsamtyktir:
UBN 11-06-2014: Ein meirluti Kristian Eli Zachariasen, Jóhann Lützen og Óluva Klettskarð taka undir við tilmælinum og at inntøkan av søluni av matr. nr. 377, 382, 395, 396, 397 fella til Havna- og Vinnunevndina. Matr. nr. 395, 396, 397 vera seld undir einum. Ein minniluti Gunvá við Keldu og Elsebeth Mercedis Gunnleygdóttur taka støðu í býráðnum.

FíN 17-06-2014: Nevndin mælir til at selja matr. nr. 395, 396, 397 og 407 við teirri treyt, at matr. nr. 395, 396, 397 verða seld undir einum.

Nevndin mælir somuleiðis til, at umsitingin fer í samráðingar við áhugaðar uppatliggjandi eigarar til matr. nr. 377 og 382 um møguliga sølu, sum verður lagt fyri nevndir aftur. Atlit eiga at verða tikin at niðurstøðum hjá Varðveitingarbólkinum í samband við matr. nr. 382.

Nevndin tekur undir við viðtøkuni hjá UBN 11-06-2014 um, at inntøkan av søluni av matr. nr. 377, 382, 395, 396, 397 fella til Havna- og Vinnunevndina.

BýR 19-06-2014:
Broytingaruppskot frá Gunvá við Keldu um at beina málið aftur í umsitingina fall við 3 atkv. fyri - GvK, SOJ og HJS - og 5 ímóti - KEZ, SVJ, JL, ÓK og JS - og 3 blonkum - EMG, EÓP og ASJ.

Tilmælið frá meirilutanum í FíN 17-06-2014 samtykt við 8 atkvøðum fyri - Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð, Jóhan Lützen, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Eyðstein Ó. Poulsen og Atli S. Justinussen - og 3 blankar - Gunvá við Keldu, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur og Herfrí J. Sørensen - og ongari ímóti.

BýR 11-09-2014: Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

EYKAMÁL
95/14
14/00730 Umsókn um frávik frá byggilinju, Bústaðir - matr. nr. 1463

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	01.09.2014	48/14	
2 Klaksvíkar Býráð	11.09.2014	95/14	

Frágreiðing um málið:
Í samband við at Bústaðir ætlar at byggja vardar íbúðir á matr. nr. 1463 millum Heygaveg og Kráargøtu, søkir Bústaðir um loyvi at byggja 3,66 metrar fra vegmarki í mun til loyvdu 5 metrar.
Tey flestu húsini á niðaru síðu av Kráargøtu og longur norðuri á Kjalarvegnum standa umleið 3 metrar frá vegmarki.

Kráargøta er sett til at verða ein ferðsluberandi vegur í byggisamtyktini.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Galdandi 5 metra byggilinja (reyð) - Ferðsluberandi vegur

<u>Lógargrundarlag:</u>
3. gr. Byggilinjur.
Sambært kortskjali 1 tilhoyrandi hesa samtykt.

1. **Byggilinjur framvið veg**
   Byggilinja framvið vegi er at skilja soleiðis, at ikki má byggjast nærri vegin enn ásett er í pkt. a, b og c

   a) Ferðsluberandi vegir:
      Byggilinjan er sett til 5 metrar frá bakkanti gongubreyt, og verður hendan linjan sett út frá eini vegalinjuføring, sum er góðkend av avvarandi vegamyndugleika

<u>Tilmæli:</u>
Umsitingin mælir til, at geva frávik fyri byggilinju við tí grundgeving at:

- Grannahúsini standa nærri vegnum enn tað, sum søkt verður um.
- Øll grundøkini á niðaru síðu við Kráargøtu eru ábygd.
- Umsitingin mælir til, at hugt verður eftir ferðsluviðurskiftinum á allari eystursíðuni.

<u>Nevndarsamtyktir:</u>
UBN 01-09-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 28-08-2014.

BýR 11-09-2014: *Steinbjørn O. Jacobsen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Tilmælið frá UBN 01-09-2014 einmælt samtykt.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI